# Hetta hevði eg ikki væntað

**Men eftir eitt sannførandi úrslit á fólkatingsvalinum, er ongin ivi um, at Johan Dahl í Porkeri eisini verður biðin um at stilla upp til løgtingsvalið, sum verður longu í vár.**

FÓLKATINGSVALIÐ
*Áki Bertholdsen*

Sambandsflokkurin í Suðuroy hevur fingið ein nýggjan profil.

Líka til týskvøldið, var Johan Dahl í Porkeri eitt púra óskrivað blað í føroyskum politikki.

Men eftir fólkatingsvalið, er tað púra greitt, at nú stendur tað til hann sjálvan at gera av, um hann eisini skal stilla upp til løgtingstingsvalið, sum verður longu í vár. Og tað er somuleiðis púra greitt, at stillar hann upp, er tað alt sum bendir á, at hann eisini verður løgtingsmaður tað næsta valskeiðið.

Tá ið atkvøðurnar vórðu taldar upp, lógu ikki færri enn 169 atkvøður í tí persónligu rúgvuni hjá Johan Dahl.

Tað ger hann til nummar fimm hjá sambandsflokkinum í øllum landinum. Bara Lisbeth Petersen, Alfred Olsen, Edmund Joensen og Marjus Dam, fingu fleiri atkvøður enn hann.

Tað gevur honum eisini hálva triðju ferðir so nógvar atkvøður borgarstjórin á Tvøroyri, Finnleif Guttesen, sum hevur verið uppstillaður fleiri ferðir, fekk. Og tað gevur honum næstan sjey ferðir so nógvar atkvøður, sum Jákup Joensen í Lopra, sum sat á tingi fyri sambandsflokkin frá 1994- 1998, og sum annars eisini hevur verið uppstillaður nakrar ferðir, fekk

– Tað er heilt vist, at hetta er nógv meiri, enn eg hevði væntað. Eg havi ongantíð verið uppi í politikki áður og eg havi ongantíð havt við politikk at gera. Tí eri eg ómetaliga væl nøgdur við at fáa eitt so gott úrslit.

Men yvirhøvur fekk eisini sambandsflokkurin nógv meiri, enn hann hevði væntað.

Hann sigur, at sambandsflokkurin gekk fram allastaðni og eisini í Suðuroy, fekk hann hesuferð 300 atkvøður fleiri enn seinast.

– Sambandsflokkurin er nú størsti flokkur í landinum. Var løgtingsval nú, hevði hann kunna skipa samgongu saman við javnaðarflokkinum einsamøllum.

Johan Dahl sigur, at nú hevur fólkið talað.

Tað, sum fólkið ikki slapp at siga í mei, tá ið fólkaatkvøðan varð avlýst, hevur fólkið sagt nú, nevniliga kortanei til fullveldisætlanina.

Johan Dahl heldur, at sambandsflokkurin hevur fingið nógvar atkvøður frá fólkaflokkinum, sum hava verið misnøgdir við støðuloysi hjá fólkaflokkinum í fullveldismálinum, har vongurin hjá Óla Breckmann hevur hálað ein veg ímóti fullveldisgongdini og vongurin hjá Anfinni Kallsberg hevur hála øvugtan veg, ímóti fullveldi, sum hann málber seg.



*Endi eg uppi í politikki, vil eg fegin gera mítt besta. Men tað verður ein spurningur um raðfesting og tað ber hvørki til at ríða á tveimum hestum ella at tæna fleiri harrum, sigur nýggi profilurin hjá sambandsflokkinum í Suðuroy, Johan Dahl*

## Ikki ætlanin

Johan Dahl sigur, at hann hevur ongantíð ætlað at stilla upp til væl. Men tá ið heitt varð á hann um at stilla upp til fólkatingsvalið, játtaði hann.

At hann stillaði upp fyri sambandsflokkin, tá ið tað endiliga skuldi vera, tað var ikki óvæntað, tí hann sigur, at hann hevur verið sambandsmaður allar sínar dagar.

– Tá ið eg játtaði at stilla upp, var tað av fleiri orsøkum. Eg vildi fegin sleppa sambandsflokkinum undan teirri misvísandi mytuni, at tað er einki uttan ein flokkur, av gomlum, konservativum monnum. Fólkaflokkurin skal heldur ikki hava patent upp á vinnulívið, tí sambandsflokkurin er ein frælslyntur og modernaður flokkur, sum hevur ein politikk, sum avgjørt gagnar vinnulívinum og sostatt samfelagnum sum heild.

Men hann heldur eisini, at tað hevur ómetaligan týdning at øll gera tað, tey kunnu at vísa á, hvussu vandamikil fullveldisgongdin er.

– Tað hevur alstóran týdning at vit varðveita ríkisfelagsskapin, tí hann gevur okkum nógvar fyrimunir, bæði sosialar, útbúgvingarligar, men eisini vinnuliga eru møguleikar í ríkisfelagsskapinum, sum vit brúka ov lítið, eitt nú vinnuframaskipanir og alternativir íløgu- og fíggingarmøguleikar, umframt at so fáa vit vit brúkt eina uttanríkistænastu, sum vit annars ikki hava atgongd til.

## Roknar við tí

Johan Dahl sigur, at eftir fólkatingsvalið, er ongin ivi um, at hann fer allarhelst at taka av, verður heitt á hann um at stilla upp til løgtingsvalið eisini.

– Hetta er ikki ein spurningur eg havi hugsað um áðrenn, men eftir góða úrslitið týsdagin, hevði eg helst tikið av.

Men fái eg eina áheitan, fari eg sjálvsagt at ráðføra meg við húski og næstringarnir, tí tann avgerðin er so stór, at hana kann eg ikki taka einsamallur.

Johan Dahl er eisini vinnulívsmaður við nógvum virksemi í Vági og skal hann stilla upp til løgtingsval, verður tað eisini ein spurningur um raðfesting.

– Eg royni at gera mítt besta hvønn dag í tí virksemi, vit hava í Vági. Og endi eg uppi í politikki, vil eg eisini fegin gera mítt besta har. Spurningurin er so, hvussu tað kann sameinast og tað ber hvørki til at ríða á tveimum hestum ella at tæna fleiri harrum, sigur Johan Dahl.

– Annars vil eg fegin takka teimum, sum stuðlaðu sambandsflokkin og meg persónliga á fólkatingsvalinum, Vónandi verða teir misnøgdu fólkafloksveljararnir, sum hesuferð vístu okkum álit, verandi í sambandsflokkinum, sigur Johan Dahl.

# Sleppa ikki longur undan at betala skatt

**Nú skal eitt hol typpast í skattalógini, sum higartil hevur givið vinnulívsmonnum møguleikan at stinga stórar upphæddir í lumman, skattafrítt**

SPEKULATIÓN
*Áki Bertholdsen*

Nú er aftur eitt hol typt í skattalógini.

Tað er eitt hol, sum higartil hevur givið vinnulívsmonnum møguleika til at stinga stórar upphæddir í lumman, púra skattafrítt.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur lagt uppskot fyri tingið um at broyta vinnuskattalógina.

Hetta er ein lóg, sum hevur til endamáls at tryggja, at skattur altíð verður latin av tí vinningi, sum vinnulívsfólk hava.

Sum er, ber tað nevniliga í ávísum førum til at stinga stórar, skattafríar upphæddir í lumman, men hetta skal nú forðast.

Tað er, tá ið partabrøv verða seld, at tað í ávísum førum ber til at stinga allan vinningin í lumman, skattafrítt

– Tá ið ein vinnulívsmaður hevur átt eitt partabræv í 10 ár, ber kann hann selja tað og stinga vinningin í lumman, skattafrítt, sigur Karsten Hansen

Hesin møguleikin er brúktur fleiri ferðir, eitt nú tá ið skip verða seld.

Eigarar, sum hava átt skip í meiri enn 10 ár, hava higartil kunnað selt partafelagið við skipinum og fingið vinningin í lumman skattafrían.

Dømi eru um skip, sum fyri meiri enn 10 árum síðani, vórðu keypt fyri nakrar hundrað túsund krónur. Nú er alt partafelagið, við skipi og fiskiloyvi selt aftur fyri fleiri milliónir.

Men vinnulívsmaðurin, sum seldi, kundi stinga allan vinningin uppá fleiri milliónir í lumman, uttan at betala eitt oyra í skatti.

Er fyritøkan trý ára gomul, verða 25% goldin í skatti av vinninginum.

Eftir uppskotinum, sum nú er lagt fyri tingið, skulu 35% altíð latast í skatti av tí vinningi ein hevur.

– So leingi peningurin er í fyritøkuni, verður hann viðfarin, sum higartil. Men í somu løtu, hann peningurin verður tikin úr fyritøkuni í egnan lumma, skal hann skattast og so ger tað tað sama, hvussu gomul fyritøkan er, sigur Karsten Hansen.

– Tað verður sami skattur av vinninginum frá fyrsta degi til tann síðsta.



*Fríggjadagin legði Karsten Hansen, landsstýrismaður uppskot fyri tingið, sum typpir eitt stórt hol í skattalógini sum hevur gjørt tað møguligt hjá vinnulívsfólkum at sleppa undan at betala skatt í fleiri førum*

## Kunnu saktans spekulera

Hann sigur, at hann hevur als onki ímóti, at fólk spekulera í pengum.

– Men so skal tað spekulerast í at vinna pening. Meiri vinning, vinnulívið gevur, betri er tað fyri samfelagið og landskassan.

– Tey, sum hinvegin spekulera í skattalógini, spekulera í veruleikanum við pengum hjá øðrum og tað er hetta, vit nú hava steðgað.

Karsten Hansen ivast ikki í, at vinnulívið fer sum heild at taka væl undir við hesum, tí allarflestu vinnulívsmenn arbeiða í fullum álvara, men tað eru altíð nakrir fáir, sum liva av at misbrúka skattalógina og tær skipanir, sum eru, og tað er hesum misbrúkinum, vit steðga nú.

Og fyri at forða skattaspekulatión í evstu løtu, áðrenn lógin verður kunngjørd, stendur í lógini, at hon kemur í gildi frá tí degi, hon er løgd fyri tingið, og tasð varð hon fríggjadagin.



# Tølini tala fyri Sambandsflokkinum

**Sambandsflokkurin setti akvøðumet á fólkatingsvalinum týsdagin. Tað hevur heldur ongantíð áður verið so stórur áhugi fyri nøkrum fólkatingsvali áður. Endaliga úrslitið vísir, at yvir trítusund fólk fleiri vóru á valið hesaferð enn seinast, og veljarakanningarnar fingu eisini eitt skot fyri bógvin**

FÓLKATINGSVAL
*Heri á Rógvi*



*Sambandsflokkurin gjørdist stóri vinnarin á fólkatingsvalinum týsdagin. Flokkurin stillaði heili 26 valevni upp, og hetta gav úrslit. Floksformaðurin, Lisbeth L. Petersen, fekk sjálv 2286 atkvøður*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Á fólkatingsvalinum týsdagin vóru heili 26.334 fólk á vali. Hetta gevur eina valluttøku upp á 79,5%. Hyggja vit eftir hagtølunum, so hevur valluttøkan ongantíð verið so stór áður, heldur ikki hava so nógvir føroyingar verið á fólkatingsvali áður. 33.106 fólk høvdu valrætt, og hetta er góð 1.800 fólk fleiri enn við valið í 1998.

Við valið 10. mai 1988 vóru 70,3% ella 22.912 fólk á vali. Við valið 8. september 1987 vóru 22.228 fólk á vali, og tað er ein valluttøkan áljóðandi 68,9%. Tað var samstundis eisini við hetta valið, at Fólkaflokkurin setti met 6.411 atkvøðum. Hetta met var sligið týskvøldið, tá ið Sambandsflokkurin fekk 7.196 atkvøður, men so skal tað eisini við, at yvir 4.000 fólk fleiri vóru á val týsdagin enn í 1987. Samstundis sigur hetta okkum, at tað eru komnir 2.688 sambandsveljarar afturat síðani seinasta val.

At áhugin var so stórur fyri fólkatingsvalinum í ár er kanska tað mest merkisverda. Við valið í 1990 var valluttøkan 54,1%, og við seinasta val í 1998 var vallutøkan 66,1%. Hagtølini siga okkum, at áhugin vanliga hevur verið ógvuliga vánaligur fyri fólkatingsval. Við flestu valini hevur valluttøkan ligið um tey 55%, men tað hevur eisini verið bæði betri og verri. Við valini í fimmtiárunum var áhugin at kalla eingin, og valluttøkan lá í miðal um tey tríati prosentini.

## Veljarakanningar

Hóast tað kom sum eitt sindur av einum hvøkki, tá ið danski forsætisráðharrin kunngjørdi, at val skuldi vera 20. november, bert fáar vikur áðrenn henda góða dag, so hevur hetta ikki merkt, at tað hevur skortað við veljarakanningum.

Tríggjar ymsar veljarakanningar eru gjørdar við stuttum millumbili. Kanningarnar vístu allar, at Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin kunna vænta sær hvør sítt sæti á fólkatingi, og hetta vísti seg eisini at gerast soleiðis.

Frá teirra fyrstu veljararakanningini til tað síðstu, var tað tó ein ávísur munur at hóma. Eftir øllum at døma, skuldu kanningarnar siga okkum, at Tjóðveldisflokkurin gekk frá hinum flokkunum, og Sambandsflokkurin kom alsamt tættari at forfylgjarunum úr Javnaðarflokkinum. Fólkaflokkurin lá alla tíðina til eitt fjórða pláss, men tann so kendi endaspurturin hjá fólkafloksmonnum varð eisini spáddur at fáa stóra ávirkan.

Nú tá ið úrslitið fyriliggur, og vit øll eru øll vorðin tað klókari, so sigur tað okkum so mikið sum, at Veljarakanningarnar vóru skeivar á summum økjum.

Sambandsflokkurin gjørdist stóri og tryggi sigursharrin á fólkatingsvalinum, tá ið flokkurin tryggjaði sær 7.196 atkvøður ella 27,3% av atkvøðum. Tjóðveldisflokkurin fór aftur á eitt annað pláss, men fekk framvegis umboðan á fólkatingi. Javnaðarflokkurin gjørdist 400 atkvøður ov stuttur hesaferð, og úrslitið hesaferð var faktiskt betri enn við valið seinast við einari lítlari framgongd. Hinvegin so kláraði Fólkaflokkurin og Óli Breckmann ikki at venda rákini, sum tað so dúgliga var spáa um frammanunfan valinum. Hóast teir gjørdu eitt lítið kvink uppeftir í mun til veljarakanningarnar, so gjørdist úrsltið framvegis ein afturgong uppá 6,4%. Sjálv afturgongdin í atkvøðutalinum var ikki so meira enn 162 atkvøður, men greitt er, at Fólkaflokkurin, eftir at hava verið umboðaður á fólkatingi í longri tíð, datt heilt niðurímillum við valið hesaferð.

Teir báðir smærru flokkarnir, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, fingu ikki nógv í veljarakanningunum fyri valið, og valúrslitið gav teimum heldur ikki tær nógvu atkvøðurnar.

Miðflokkurin gjørdist størri av teimum báðu smærru. Endaúrslitið má mestir geva teimum ovarliga í Sjálvstýrisflokkinum nakað at hugsa um.



*Ongantíð áður hava tað verið so nógv fólk og valt til eitt fólkatingsval sum týsdagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Løgtingsvalið

Fólkatingsval og løgtingsval eru hvør sítt - so er tað sagt. Um vit nú hyggja eitt sindur eftir teimum hellingum, sum eru at hóma í valúrslitinum, so sæst, at einamest Sambandslflokkurin hevur gjørt risa framstig á fleiri valstøðum, har tað vanliga ikki plagar at liggja so væl fyri hjá flokkinum. Eitt nú í Fuglafirði og í Vági var Sambandsflokkurin beint við at vera størstur flokkur, og har hevur fyrr gingið illa hjá Sambandsflokkinum – í øllum førum í seinastu valini. Eisini aðrar gamlar »sambandsbygdir«, eitt nú Vestmanna góvu Sambandsflokkinum rættiliga nógvar atkvøður.

Tað, sum kanska er mest áhugavert, er úrslitið í Vágoynni. Úrslitið sigur okkum, at eftir at nógvar sambandsatkvøður fóru til Sjálvstýrisflokkin seinast, so komu tær so ruddiliga aftur, og Sambandsflokkurin hevði tvær ferðir so nógvar atkvøður sum tann næsti á listanum, og hetta gevur tveir tingmenn til eitt løgtingsval.

## Polarisering

Mest nýtta orðið til hetta valstríðið, uttan nakran líka, hevur verið polarisering. Sambært teimum kønu og minnu kønu, so skyldast úrsltið av valinum týsdagin, at føroyski veljaraskarin er tvíbýttur yvir teir báðar polarnar á lodrætta ásanum í føroyskum politikki.

Samstundis sum bæði Tjóðveldis- og Sambandsflokkurin hava nýtt gott av hesum, so hava Javnaðar- og Fólkaflokkurin dúgliga roynt at selja seg sum flokkar í miðjuni, men skal mann trúgva tí, sum er sagt, so hevur hetta ikki eydnast.

